Viðmerkingar til hoyringssvar frá:

- KT-felagnum,
- Hagstovu Føroya,
- Gjaldstovuni,
- Felagnum Peningastovnar og
- Klintra

Fylgiskjal 4

Sum tað stendur í viðmerkingunum til lógaruppskotið og í Heildarætlanini, so er talan um eina nútímansgerð og framtíðartryggjan av gomlu KT-skipanunum hjá TAKS. Talan er um, at forrætningslogikkurin í KT-skipanini, sum longu er á Elektron, verður endurskoðaður, nútíðargjørdur og framtíðartryggjaður. Oman á hetta verður so gjørt eitt nýtt nýtslumarkamót til starvsfólkini á TAKS. Hetta verður ein kollvelting í effektiviteti og í brúkaravinseminum hjá starvsfólkunum. Í stuttum er høvuðsmálið sostatt, at gamla KT-skipanin verður framtíðartryggjað, og høvuðsmálbólkurin/brúkararnir eru starvsfólkini á TAKS.

Tað tykist sum nakrir av hoyringspørtunum ikki ordiliga hava skilt, hvat verkætlanin í veruleikanum snýr seg um. Talan er um eina innanhýsis KT-verkætlan hjá TAKS. Verkætlanin ávirkar sum útgangsstøði ongar áhugabólkar uttanfyri TAKS, hvørki borgarar, vinnu ella teir nógvu áhugabólkar, sum hava ymisk talgild markamót við TAKS, har dátur verða útvekslaðar. Tað merkir, at markamót við eitt nú til Gjaldstovuna, Hagstovuna, peningastovnar, Almannaverkið, ALS, Virkið, Vangan, FÓLK og onnur vera sum útgangsstøði óbroytt. Sjálvt Borgaragluggin og Vinnugluggin hjá TAKS eru ikki partar av hesi verkætlanini. Tó verður tað soleiðis, at har tað verður mett at vera gagnligt at endurskoða og nútímansgera markamótini við eksternar áhugabólkar, so verður hetta gjørt í samráði við hvønn einstakan áhugabólk, og tá verður útgangsstøði tikið í, at nýggj markamót verða gjørd umvegis Heldina hjá Talgildu Føroyum.

Tað tykist, sum nakrir av hoyringspørtunum vilja knýta onnur viðurskifti upp í hesa verkætlanina, sum ikki eru partar av verkætlanini. Ein nýggjur lønarportalur er ikki partur av hesi verkætlanini. Tað er ein heilt onnur verkætlan, sum annars eisini eigur at verða sett á skrá sum skjótast. Hagstova Føroya fær í dag allar tær dátur, sum eru tøkar, og sum Hagstovan ynskir, men verkætlanin snýr seg ikki um at fáa nýggjar dátur til vega, sum ikki longu eru í skipanini. TAKS hevur tó stóran áhuga í, at dátur verða so tøkar sum gjørligt, bæði til egna og eksterna nýtslu, og har møguleiki verður fyri at betra um atkomu og góðsku av dátum, verður miðað eftir, at hetta verður gjørt.

Í hoyringssvarinum hjá Gjaldstovuni verður gjørt nakað burtur úr kontoskipan, transaktiónsslóðum, høvuðsbók o.s.fr. Tað er sjálvandi týdningarmikið, at hesin parturin í minsta lagi virkar líka væl sum nú, og til hetta er at siga, at í verkætlanini er júst ein partur, sum snýr seg um bókhald, debitorstýring við meira, og er hetta helst ein partur, sum hevur áhuga hjá Gjaldstovuni. Um broytingar skulu gerast í stóra markamótinum við Gjaldstovuna, so verður tað í samráð við Gjaldstovuna.

Tað er týdningarmikið at leggja sær í geyma, at verkætlanin fær loyvi til at snúgva seg um og avmarka seg til tað, sum verkætlanin snýr seg um. Tað vil siga, sum sagt verður á fakmáli, at man heldur seg til "scope'ið". Annars verður talan um eina heilt aðra og nógv størri verkætlan, enn talan er um í løtuni.

Onkur av hoyringspørtunum førur fram, at talan er um Føroya størstu einstøku KT-verkætlan. Hetta er ikki heilt rætt. Talan er um at nútímansgera eina røð (program) av KT-skipanum, sum eru gjørdar og knýttar saman yvir eitt 40 ára langt tíðarskeið. Talan er um 35 verkætlanir í stóru heildarætlanini. Tískil verður verkætlanin samanlagt sjálvsagt stór, men ikki kostnaðarmikil og heldur ikki trupul. Verkætlanin fer tó at krevja góða innanhýsis stýring og brúk av nógvari innanhýsis orku hjá TAKS.

Arbeiðsleistur og útboð

Ført verður fram, at váðin er óneyðuga stórur, og mælt verður til, at verkætlanin verður lutað sundur í fleiri smærri verkætlanir. TAKS er ikki samt í hesum, og TAKS metir eisini, at váðin og kostnaðurin vildi verðið nógv størri við einum slíkum leisti.

KT-skipanirnar hjá TAKS eru mentar á Elektron, og tað kemst ikki uttanum, at tað er Elektron, sum við síni vitan, má standa fyri arbeiðinum at nútímansgera forrætningslogikkin og tað, sum verður kallað back-end. Høvuðsmálið við tí er, at skipanin virkar á sama hátt sum í dag, millum annað roknar rætt eins og nú, men á einum nútíðar palli við nútíðar hentleikum.

TAKS hevur brúkt nógva orku til at velja røttu tøknina til menning av front-end nýtslumarkamótinum, og bleiv niðurstøðan, at hetta verður ment í OutSystems. Sama tøkni, sum Talgildu Føroyar brúka. At onkrir føroyskir veitarar ikki eru samdir í hesum vali, er TAKS óviðkomandi, men tað er ivaleyst rætt, at tað kanska í framtíðini finst onnur front-end tøkni, sum tá er betri hóskandi.

TAKS hevði útboð av menningini av front-end í OutSystems-tøknini í 2021. Tað var byrjanin upp á hesa drúgvu verkætlan. Tað vóru bert nakrir fáir veitarar, sum vístu áhuga, hóast allir veitarar vistu, at talan varð um eina langa og drúgva verkætlan, sum fór at fáa meira ferð á so líðandi, hóast tað í byrjanini var talan um avmarkaða orku og menningarupphæddir.

Tað, at TAKS stýrir verkætlanini og menningararbeiðinum við innkeyptari arbeiðsmegi, er avgerandi neyðugt fyri, at verkætlanin verður væl eydnað. Hetta er orsakað av tí leisti, sum verkætlanin verður framd uppá. Á fakmáli kallast arbeiðsleisturin "agilur", og merkir hetta í stuttum, at verkætlanin verður pettað sundur í smærri bitar og arbeitt verður við stórum fleksibiliteti og í tættum samstarvi við starvsfólkini. Við at keypa arbeiðsmegi frá føroyskum veitarum, tryggjar TAKS lutvíst, at føroyskir veitarar gerast ein partur av verkætlanini og lutvíst, at starvsfólkini fáa størst møguliga ávirkan á loysnirnar, og at teirra ómetaliga stóra forrætningsvitan verður ein virkin partur

av menningararbeiðinum. Hetta er ein modernaður arbeiðsháttur og beint tann øvugti av at gera kravfestingar frammanundan og so bjóða verkætlanina út í síni heild ella sum smærri verkætlanir. Tað ber ikki til at gera kravfestingar frammanundan, tí loysnirnar eru ikki hugsaðar enn.

TAKS skilur, at hesin arbeiðsleisturin kann vera eitt sindur avbjóðandi hjá teimum, sum ikki kenna hann. Tað er trupult at hava eftirlit við, um endaliga úrslitið er júst tað, sum man setti sær fyri frá byrjan. Veruleikin er júst tann, at tað ikki ber til at siga, hvussu endaliga loysnin verður, fyrr enn um fimm til seks ár, tá verkætlanin er liðug. Hetta er tó ikki ein ókendur arbeiðsleistur, og millum annað Talgildu Føroyar hava brúkt hendan arbeiðsháttin. Agili arbeiðsháttur vindur eisini upp á seg í grannalondum okkara í sambandi við verkætlanir innan menning av skipanum.

TAKS hevur ongar viðmerkingar til, at onkur av hoyringspørtunum metir, at hoyringsfreistin er ov stutt.

15. februar 2024

Eyðun Mørkøre, stjóri
TAKS